gult cyan magenta svart



# Móttøka í salthøllini



**Seinnaparttin fríggjadagin høvdu Eimskip og Hafnarbakki boðið viðskiftafólki og øðrum til móttøku í nýggju saltgoymsluni á Glyvrum**

HANDILSVINNA

Væl av fólki var samankomið, tá nýggja saltgoymslan á Bakka á Glyvrum alment varð tikin í nýtslu fríggjadagin.

Har vóru vinnulívsfólk, starvsfólk, grannskoðarar og nevndarlimir. Øll vóru tey komin at hoyra, hvat leiðslurnar í Eimskip í Føroyum og Hafnarbakka, sum í felag hava fingið sær slatgoymslu á Glyvrum, høvdu at siga av góðum orðum.

Og orðini vóru góð og lovandi. Stjórin á Eimskip í Føroyum helt fyri, at tað kanska fór ikki at vera so leingi, til ikki bara salt var í húsinum, tí tað kundi væl henda seg, at oljuvinnan fór at velja sær Runavíkar Havn sum útgerðarhavn, og so var hetta húsið ein sjálvsagdur partur av tí vinnuni eisini. Og tann útmeldingin kom als ikki illa við hjá býráðslimum og øðrum úr Runavíkar Kommunu.

Borgarstjórin var so glaður, at hann endaði sína røðu við at biða samkomuna rópa hurra fyri Eimskip og Hafnarbakka, sum nú av álvara vóru komin í kommununa.

**ej**



# Helena fríkend



*Føroya Rættur gav ikki Jákupi Mørkøre viðhald í, at hann var ærumeiddur av Helenu Dam á Neystabø*

**Jákup Mørkøre, fyrrverandi sjúkrahúsleiðari, tapti sakarmálið móti Helenu Dam á Neystabø**

RÆTTARMÁL
*Edvard Joensen*

Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, varð fríkend í málinum um ærumeiðing, sum Jákup Mørkøre, fyrrverandi sjúkrahúsleiðari reisti móti henni í Føroya Rætti.

Rætturin avgjørdi samstundis, at Jákup Mørkøre skal gjalda Helenu Dam á Neystabø kr. 38.000,- í sakarmálskostnaði.

Føroya Rættur segði fyrrapartin í gjár dómin í málinum, sum Jákup Mørkøre, fyrrverandi sjúkrahúsleiðari, reisti móti Helenu Dam á Neystabø, landsstýriskvinnu við Almanna- og Heilsumálum. Jákup Mørkøre metti seg ærumeiddan, tá Helena Dam á Neystabø segði hann vera illoyalan og ólýdnan í samband við, at hann boðaði frá, at hann sá seg noyddan at siga 40-50 fólkum innan sjúkrahúsverkið úr starvi.

Úrslitið varð, at Jákup Mørkøre sjálvur varð sagdur úr starvi við teirri grundgeving, at hann var illoyalur og ólýðin.

Hesa grundgeving vildi Jákup Mørkøre ikki góðtaka. Hann stevndi Helenu Dam á Neystabø við kravi um, at úttalilsi hennara vóru dømd deyð at vera, og at hon rindaði allan sakarmálskostnaðin.

Rætturin kom tó til tað beint øvugtu niðurstøðuna.

Í grundgevingin fyri dóminum, sum fríkendi Helenu Dam á Neystabø, sigur Føroya Rættur:

»Begrebene illoyal og ulydig er i almindelig sprogbrug udtryk for egenskaber, der er egnede til at nedsætte den fornærmede i medborgerens agtelse.......«

Víðari sigur rætturin í grundgevingini:

».....I nærværnde sag er begrebene ikke udbredt fra sagsøgtes side, men alene anvendt som begrundelse i afskedigelsessag. Begrebene er almindeligt anvendte begreber indenfor ansættelsesretten og begrundelsen har været pligtmæssig ..........«

Sostatt metir rætturin ikki, at Helena Dam á Neystabø alment hevur ærumeitt Jákup Mørkøre, men bert brúkt vanligt orðalag í uppsøgnini, sum skylda hennara var.

Føroya Rættur kemur tí til niðurstøðuna:
Thi kendes for ret:
Sagsøgte, Helena Dam á Neystabø, frifindes.
Sagsøgeren, Jákup Mørkøre, betaler sagsomkostninger til sagsøgte 38.000,00 kr.

# Embætisfólk eingi rættindi

**Bjørn á Heygum, advokatur, metir, at dómurin í málinum millum Jákup Mørkøre og Helenu Dam á Neystabø, gevur politikkarunum rætt at fara við embætisfólki, nærum sum teimum lystir**

RÆTTARMÁL
*Edvard Joensen*

Verjin hjá Jákupi Mørkøre heldur, at rætturin hevur í grundini staðfest, at politikkarar kunnu fara við embærisfólki næstan sum teimum lystir. Jákup Mørkøre fekk eini greið boð frá landsstýriskvinnuni. Hann roknaði seg fram til, hvussu hann kundi halda tey boðini. Tá hann so kom við úrslitinum, varð hann uppsagdur.

Bjørn á Heygum, advokatur, ivast í, um dómurin í málinum millum Jákup Mørkøre og Helenu Dam á Neystabø, kann vera rættur.

Hann fer at lesa hann sera gjølla, sigur hann, og fer síðan saman við Jákupi Mørkøre at gera av, um teir skjóta dómin inn fyri Landsrættin.

Bjørn á Heygum vísir á, at tað er ikki eindømi, at embætismaður, sum arbeiðir eftir teimum treytum, politikkararnir seta honum, verður sagdur úr starvi.

Í hesum førinum fekk Jákup Mørkøre eina heilt greitt ásetta uphædd at reka sjúkrahúsverkið fyri. Tá hann so vísti á, hvørjar fylgjurnar fóru at vera, fekk hann at vita, at hann var illoyalur og ólýðin, og varð sagdur úr starvi.

Tá so er, er ikki lætt at gera við hjá teimum, sum skulu gera avgerðirnar hjá politikkarunum til veruleika, sigur Bjørn á Heygum advokatur.

Hann ásannar, at embætisfólk í ávísan mun eru at kalla gjørd rættarleys við hesum dóminum.

Nú hevur rætturin í grundini staðfest, at ein politikkari kann geva eini boð. Tá so boðini vera fylgd, og tey ikki hóva onkrum øðrum, kann tann, sum fekk boðini, bara ábyrgdast fyri tað, politikkarin gjørdi skeivt.

Bjørn á Heygum heldur við øðrum orðum, at her er bakari rættaður fyri smið.

gult cyan magenta svart



# Altjóða døming í finaluni

**Tá steypafinalurnar í flogbólti verða leiktar, 17. februar, verður dømingin framd av dana, sum í nógv ár hevur virkað sum altjóða flogbóltsdómari**

STEYPAFINALUAR
*tíðindaskriv*

Flogbóltssambandið hevur fingið avtalu við kenda altjóða dómaran John Lilhauge, um at koma til Føroya at døma steypafinalurnar leygardagin í Høllini á Nabb.

Hetta ein ein sera royndur harri, sum hevur dømt altjóða dystir í fleiri ár. Hann er 52 ár og býr í Albertslund í Keypmannahavn. Hann gjørdist divisiónsdómari í 1966, og hevur verð aktivur dómari síðani tá. Altjóða dómaraprógv fekk John i 1985 og hevur hann síðani dømt umleið 175 altjóða dystir.

Hann hevur luttikið í Spring Cup 8 ferð, og hevur í hesum sambandi døm 3 finalur, og eisini dømdi hann finaluna í World Games for Deaf í 1997 millum Rusland og Ukraine.

## Ferðast við kvinnulandsliðnum

Í mai 2000 var hann eisini á Malta saman við føroyska kvinnulandsliðnum, sum luttók í Undankappingini um Europameistaraskapið. Hann var í kappingini mettur sum ein av teimum bestu dómarunum.

Higartil í ár hevur hann dømt altjóða Europacupdystir í Hollandi, Týskalndi og Belgia.

## Døma saman við føroyingum

Í kvinnudystinum millum Dráttur og Mjølnir verður tað Rúni Weihe, sum kemur at virka sum 2.-dómari. Rúni dømdi hegnisliga báðar finalurnar seinasta ár, so hann skuldi verði ein tann best egnaði til hetta álitið enn einaferð.

Í mansdystinum, verður tað Fleyr-arin Tummas Óli Mortensen, sum skal finna floytuna fram. Tummas Óli Mortensen hevur dømt í fleiri ár, og hevur drúgvar royndir á økinum.

Tað verður spennandi at síggja, um tað verður stór broyting í dømingini, orsakað av, at dómarin hevur altjóða viðurkenning í mun til hvat teir bestu dómararnir her heima hava dømt, tí dómaraøkið er eitt evni, sum Flogbóltssambandið fer at taka upp til komandi ár.



*Altjóða dómarin, John Lilhauge, kemur til Føroya um vikuskiftið at døma steypafinalurnar í flogbólti*

### ÍF



*Reyðar troyggjur*
*Hvítar brøkur*

| Nr. | Navn | Leikpláss | Hædd | Aldur | Landsdystir |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Hanus Eliasen | Kantur/Miðja | 182 | 17 | |
| 2 | Hans Toftegaard | Miðja | 185 | 22 | |
| 3 | Boban Ilic | Kantur | 191 | 26 | |
| 4 | Bjarne Joensen | Mið/Kant/Hev | 185 | 40 | 26 |
| 5 | Dánjal Vang | Diagonal/Kant | 185 | 17 | |
| 6 | Henry Petersen | Kantur | 178 | 17 | |
| 7 | Kenneth Neshamar | Diagonal/Kant | 184 | 25 | 17 |
| 8 | Jan Áki Olsen | Miðja | 187 | 23 | |
| 9 | Odd Eliasen | Hevari | 177 | 36 | 16 |
| 10 | Bartal Eliasen | Kantur/Hevari | 189 | 24 | |
| 11 | Jákup H. Egholm | Miðja/Kantur | 185 | 25 | |
| 12 | Jann F. Hansen | Miðja | 182 | 30 | |

Venjari: Boban Ilic
Liðformaður: Bartal Eliasen
Liðleiðarar: Áslakur Petersen

### Mjølnir




*Bláar troyggjur*
*Bláar brøkur*

| Nr. | Navn | Leikpláss | Hædd | Aldur | Landsdystir |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Rúni Eltør | Kantur | 186 | 21 | 6 |
| 2 | Bogi H. Isaksen | Hevari | 183 | 25 | |
| 3 | Jón Kári Frederiksen | Kantur | 180 | 36 | |
| 4 | Hans Pauli Steinberg | Kantur | 183 | 21 | |
| 5 | Arnfinnur Guðjónsson | Libero/Kant | 175 | 21 | |
| 6 | Hjalti Josephsen | Miðblokkur | 192 | 22 | |
| 7 | Jóannes Poulsen | Miðbl./Kantur | 185 | 35 | 24 |
| 8 | Borko Ilic | Kantur | 192 | 26 | 18 (bosnia) |
| 9 | John Syderbø | Kant/Hevari | 180 | 25 | |
| 10 | Trygvi H. Poulsen | Kantur/Miðbl. | 182 | 30 | 36 |

Venjari: Borco Ilic
Liðformaður: Bogi H. Isaksen
Liðleiðarar: Fróði Isaksen

steypafinalan:

# ÍF favorittar at vinna á Mjølni

**Mjølnir, sum meginpartin av árinum hevur verið fremsta liðið í landinum, hevur ikki spælt upp til sítt besta seinastu dystirnar**

*Flogbóltur, menn*

Leygardagin 17. februar verða steypafinalurnar leiktar í Høllini á Nabb, og sambært forsøgnini á heimasíðuni hjá Flogbóltssambandinum á www.fbf.fo, verður tað ÍF sum fer avstað við sigrinum. Íalt 54 % hava mett at ÍF fer at vinna, meðan 46 % meta at Mjølnir verður tað betra liðið.

Bæði feløgini hava sett liðini, og yvirlit yvir hesi sæst aðra staðni á síðuni.

## Samanbering

Vit hava eisini gjørt eina samanbering millum liðini. Eftir hesum at døma eru liðini ógvuliga jøvn, tá hugsa verður um miðalhædd, landsdystir í meðal og miðalaldur. So tað verður ikki á hesum økinum at nakað av liðinum fær ein avgerðandi fyrimun.

## Samanbering millum liðini

| | ÍF | Mjølnir |
|---|---|---|
| Miðalhædd: | 184,2 | 183,8 |
| Lægsti leikari: | 177,0 | 175,0 |
| Hægsti leikari: | 191,0 | 192,0 |
| Landsdystir í miðal: | 4,9 | 6,6 |
| Flestar landsdystir: | 26,0 | 36,0 |
| Miðalaldur: | 25,2 | 26,2 |
| Elsti leikari: | 40,0 | 36,0 |
| Yngsti leikari: | 17,0 | 21,0 |

Seinasti dysturin millum liðini var leiktur fyri 10 døgum síðani á Kambsdali, og tá vann ÍF 3-2, harav seinasta settið endaði 15-13. Hetta var ein væl leiktur dystur, har bæði liðini stríddist til seinasta bólt.

## Tvíburðar berjast

Hetta er eisini fyrstu ferð í Føroya Søgu, at tveir tvíburðar leika steypafinalu ímóti hvørjum ørðrum, við tað at leikandi venjararnir hjá ÍF og Mjølni eru tvíburðar.

Leikandi venjarin hjá Mjølni Borko kom higar fyri 2 árum síðani, meðan leikandi venjarin hjá ÍF Boban kom higar hetta kappingarárið. Báðir leikararnir hava avgerðandi týdning fyri teirra lið, og spennandi verður at síggja hvør teirra verður omaná eftir dystarlok.

Finalurnar vera sum sagt í Høllini á Hálsi leygardagin, og byrja verður við kvinnufinaluni kl. 14,30 meðan mansfinalan verður beint aftaná.